## Anton skal venja Víking

Brasilski Dido fekk ikki neyðuga stempilð á venjarapappírini, og tí kann hann ikki venja Formulaliðið hjá Víkingi. Í staðin verður tað tann lokali Anton Skoradal, sum annars skuldi vera hjálparvenjari hjá Dido, sum skal hava høvuðsábyrdina av samanlagda liðnum hjá gøtumonnum og leirvíkingum. Dido fer av landinum aftur. - Leiðslan harmast um støðuna, men er fegin um at Anton hevur játtað at tikið við starvinum, og sær fram til eitt spennandi kappingarár, skrivar heimasíðan hjá Víkingi.




## Holst og Tem sunnanfyri

Sunnudagin fór superligahópurin hjá Lyngby til Turkalands á venjingarlegu. Lyngby skal halda til í Antalya, og har skulu teir venja og spæla venjingardystir sum fyrireiking til kappingarbyrjan tann 16. Mars. Millum spælararnar í hópinum eru tveir føroyskir landsliðsspælarar – Christian Lamhauge Holst og Tem Hansen. Veðrið er gott í Turkalandi, og Lyngby-spælararnir kunnu venja í shorts – hitin liggur um 20 stig.

Kyndil-StÍF 24-22 (11-11):

# Finalukósin er grøn

**Við sigri á StÍF helt Kyndil rimmarfast um møguleikan at spæla seg í FM-finaluna**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað tykist alt meira sannlíkt, at Kyndil verður ein ósannlíkur luttakari í FM-finaluni í manshondbólti 2008.

Fyri bara fáum vikum síðani tóktist møguleikin annars púrasta óveruligur, men við fleiri góðum avrikum á rað eru Kyndils-menn nú bert eitt stig frá Neistanum. Gaman í við einum dysti fleiri, men verður hugsað um, at liðinum vantar seinasta innanhýsis dystin, eins og Neistin enn eigur útidystin á Skála á, so tykist finaluluttøkan liggja beint til høgra armin hjá Høgna Klein og hinum í Kyndli.



*Verjuparturin riggaði framúr, tá Kyndil stríddi heldur enn spældi seg til tvey sera týðandi stig móti StÍF*
Mynd: Álvur Haraldsen

### Intensitur

Tað var annars ikki tað vakra hondbóltsspælið, sum var í fokus sunnudagin.

Týdningurin av dystinum var kanska ov stórur hjá heimaliðnum til tess. Og eisini gestirnir vóru uppsettir, nú teir skuldu hevna fyrsta finalutapið í fimm ár.

Og úrslitið var ein dystur, har intensiteturin og spenningurin vóru væl betri enn hondbóltsspælið. Og har málverjarnir helst vóru betur nøgdir um sítt avrik, enn útispælararnir vóru tað.

Fyrstu longu løtuna tóktust gestirnir hava meira at geva av. Hóast StÍF gjørdi fleiri teknisk mistøk í álopsspælinum, so megnaði Kyndil ikki at revsa hesi. Og heldur ikki tá strandingar spældu í undirtali, fall hamarin.

### Høgni og hinir

Tað hevur fleiri verið nevnt, hvussu stóran týdning tað hevur fyri Kyndil, at teir nú aftur hava Høgna Klein við á liðnum. Og hóast spælskiparin ikki megnaði at fáa tað heilt skipaða spælið upp at standa sunnudagin, so hevði hann kortini sín avgerandi leiklut í dystinum. Bæði tí hann støðugt er maðurin, sum dregur og skumpar liðfelagarnar framá, men eisini tí hann hóast alt hevði sínar framúr vøkru detaljur í einum annars rótutunum dysti. Eitt nú við tveimum fantastiskum innspælingum inn á strikuna, og so tá hann onkursvegna fann uppá at lobba bóltin í netið av tríggjametra strikuni. Allar tríggjar detaljurnar í avgerandi løtunum av dystinum, og júst tað ber veruliga boð um ein stórspælara.

Og tá so aðrir á Kyndilsliðnum fylgdu við, komu neyðugu málini eisini. Hanus Johansen skoraði nakrar ferðir úr at síggja til vónleysum støðum, og Finnur Hansson hevði nøkur fín mál, hóast onkrir avbrennarar eisini vóru at síggja.

Og til hetta StÍF ikki nakað aftursvar. Danni Syhler og David Edvardsen hava í nógvum dystum verið berandi kreftir hjá liðnum, men tað vóru teir ikki hesaferð. Syhler tóktist hava hug at gloyma, at hondbóltur sanniliga eisini er liðspæl. Og Edvardsen hevði meira enn ilt við at síggja netmeskarnar handan Lars Black, hóast hann fleiri ferðir stóð væl fyri á veinginum.

### Finaluvegurin

Og við sigrinum er Kyndil framvegis á finalukós. Fyri vikusíðani var staðfestingin, at Kyndil nú hevði fimm finalur eftir at spæla, og í fyrstu tveimum av hesum hevur liðið staðið royndina.

Á pappírinum hevur Neistin enn fyrimunin, tí teir skulu missa fýra stig, áðrenn Kyndil kann kenna seg hampuliga trygt. Men Neistin skal framvegis til Skála á útferð, og við seinastu dystunum í huga, so er StÍF stórfavorittur til ta uppgerðina.

Tí kann Kyndil skapa sær best hugsandi fortreytirnar, um teir bara syrgja fyri at gera sítt arbeiði. Og nú StÍF er lagt aftur um bak, er talan her um tríggjar dystir á Hálsi. Nevnliga heima móti H71 og KÍF, meðan útidysturin er móti Neistanum.

## FAKTA

**Kyndil-StÍF 24-22 (11-11)**
10 min: 3-4
20 min: 7-8
40 min: 14-15
50 min: 20-19
**Málskjúttar**
**Kyndil:** Finnur Hansson 7, Høgni Klein 5, Hans Áki Dal Christiansen 4(3), Hjalti M. Jacobsen 3, Hanus Johansen 3, Ken Zachariassen 1, Janus Einar Sørensen 1
**StÍF:** Sveinur Justinussen 6, Danni Syhler 4, Bent Djurhuus 3, Bárður Danielsen 3, David Edvardsen 3, Leivur Justinussen 1, Jón Rasmussen 1, Borgar Danielsen 1
**Brotskøst:** Kyndil 5
**Útvísingar:** Kyndil 1, StÍF 7
**Dómarar:** Kári Hansen & Dánjal Samuelsen

## Týdningurin tyngdi

- Hetta var ein sera týðandi dystur fyri okkum, og tá verður talan sjáldan um tað vakra hondbóltsspæli, men heldur um ein dyst, har allir geva seg 100%. So eg hevði ikki rokna við so nógvum øðrum.

Og í dystinum høvdu tit tað tungt. Í øllum førum var StÍF á odda stóran part av teimum 60 minuttunum?

- Ja, men eg haldi kortini, at vit halda teimum væl. Vit hava sjálvandi okkara trupulleikar við at skora, hóast vit fáa møguleikar, men hinvegin fáa teir heldur ikki so nógv mál. Serliga tí Lars tekur so nógv av vengrunum hjá teimum. Vit hanga alla tíðina í.

Og sum støðan er í dag, so hevur tú ikki ráð at gevast?

- Nei. Sjálvandi er tað irriterandi, tá tú ikki fært mál, men tað er bara at renna retur, og so royna aftur næstu ferð.

Nú eru tríggir dystir eftir at spæla í endaspælinum. Er tað FM-finalan, sum nú stendur fyri framman?

- Tað vil eg ikki siga. Men vit hava tríggjar dystir eftir, og teir skulu vinna. So mugu vit fáa at síggja, hvussu tað spælir av.

Og verður Høgni Klein eisini við í teimum trimum dystunum?

- Tað veit eg ikki. Tað eri ikki eg, sum taki ta avgerðina, sigur grøni maðurin við 10-talinum á rygginum.

**-mørk**